# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 06.03.2019
Mál nr.: 19/00063
Málsviðgjørt: JPP
Eftirkannað: 21.02.2019

**Løgtingsmál nr. 130/2018: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler**

## Uppskot til

## Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar

## Lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar niðanfyristandandi uppskot

## Forslag til

## Lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler

**§ 1.** Bestemmelserne i Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 2015/847 om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler, jf. Bilag 1 til denne lov, gælder for Færøerne.

**§ 2.** Erhvervsministeren kan, efter forudgående høring hos det Færøske Landsstyre, fastsætte regler for Færøerne om anvendelsen af bestemmelserne i forordningen, jf. § 1, herunder om de ændringer af bestemmelserne, som de færøske forhold tilsiger.

**§ 3.** Der kan pålægges selskaber m.v. (juridiske personer) strafansvar efter reglerne i 5. kapitel i den for Færøerne gældende straffelov.

**§ 4.** Erhvervsministeren fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden.
*Stk. 2.* Ved tidspunktet for dennes lovs ikrafttræden, ophæves lov nr. 467 af 17. juni 2008 for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler.

*(Av tekniskum orsøkum er fyriskipanin og bæði "berigtigelser", tvs. bilag 1, bilag 1.1 og bilag 1.2 sett inn sum skjøl aftast í lógaruppskotinum.)*

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

**Lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler,** er ein donsk lóg, sum setur ásetingarnar í eini ES-fyrskipan í gildi fyri Føroyar.

Lógaruppskotið er liður í at dagføra lógarverkið kring føroysku peningastovnarnar. Uppskotið er nær tengt at lógini um fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi (hvítvaskslógin), sum eftir ætlan verður sett í gildi samstundis sum hendan lógin.

Fíggjarmálaráðið hevur strongt á donsku myndugleikarnar um at fáa hesar lógir settar gildi fyri Føroyar, og loksins eru uppskotini klár at viðgera, og skulu eftir ætlan verða galdandi frá 1. apríl 2019.

Fyri landsstýrið er tað av stórum týdningi, at lóggáva ikki verður sett í gildi fyri Føroyar uttan samtykki frá føroyskum myndugleikum. Tí er eftir ynski frá landsstýrinum innført í § 2, at danski ráðharrin á økinum skal hoyra Føroya Landsstýri, áðrenn hann kann áseta kunngerðir við heimild lógini.

Ásetingarnar í fyriskipanini snúgva seg um, hvørjar upplýsingar skulu leggjast við um gjaldaran, í sambandi við peningaflutning, sum gjaldsmiðlari í Føroyum sendir og/ella tekur ímóti. Henda ES-fyriskipan (EU-847/2015) er longu galdandi í Danmark, tí ES-fyriskipanir eru galdandi í øllum ES-londunum frá tí, at tær eru lýstar í Brússel. Slík lóggáva fer sostatt ikki inn um danska tinggátt og verður ikki til danska lóggávu, sum kann setast í gildi fyri Føroyar á vanligan hátt við kongaligari fyriskipan.

Neyðugt er tí at gera eina serstaka lóg fyri Føroyar, sum setur ásetingarnar í ES-fyriskipanini í gildi fyri Føroyar. Í lógini stendur, at ásetingarnar í ES-fyriskipanini (EU-847/2015), sum eru viðlagdar sum fylgiskjal til lógina, eru galdandi í Føroyum.

Tá talan er um ríkislóggávu, skal Føroya Løgting hava samtykt lógaruppskotið, áðrenn tað fer til 3. viðgerð í danska fólkatinginum. Lóggávuleisturin, har ásetingarnar í eini ES-fyriskipan verða settar í gildi fyri Føroyar umvegis eina danska ríkislóg, er royndur einaferð áður. Tað var í 2015, tá ásetingarnar í CRR-fyriskipanini[1] vórðu settar í gildi fyri Føroyar.

Ásetingarnar í ES-fyriskipanini snúgva seg, sum sagt, um tær upplýsingar, sum skulu fylgja við, tá peningaflytingar verða framdar. Endamálið við ásetingunum í fyriskipanini er, at fyribyrgja, avdúka og eftirkanna hvítvask av peningi og fígging av yvirgangi.

Danska Ídnaðarmálaráðið hevur fingið boð frá ES-myndugleikunum um, at um Føroyar ikki dagføra lóggávuna á hvítvasksøkinum, soleiðis at hon samsvarar við ES-lóggávuna, so verða føroysku peningastovnarnir skrásettir sum verandi "ikki javngildir" við peningastovnar í ES. Føroyar verða tá skrásettar sum 3. land hvat peningaflytingum viðvíkur, og kann tað darva

[1] CRR stendur fyri Capital Requirement Regulation og snýr seg m.a. um kapitalkrøv og gjaldføriskrøv til peningastovnar.

virkseminum hjá føroysku peningastovnunum heilt nógv. T.d. verða straksflytingar millum føroyskar bankar og aðrar bankar í ES, eisini danskar, ikki loyvdar.

Vanligu viðmerkingarnar til lógaruppskotið eru viðlagdar sum fylgiskjal 1. Hesar geva eina meiri fullfíggjaða mynd av innihaldinum í ES-fyriskipanini og lýsa eisini væl tørvin á at fáa lógina setta í gildi sum skjótast. Serligu viðmerkingarnar til einstøku greinarnar síggjast í kapittuli 3 í hesum skjali.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóg á økinum er *lovbekendtgørelse nr. 80 af 4. februar 2011 om lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler*. Lógin varð samtykt í løgtinginum 14. mars 2008. Tá varð annar lóggávuleistur nýttur. Donsku myndugleikarnir valdu tá at skriva tágaldandi ES-fyriskipan um til eina lóg fyri Føroyar. Lógin var síðani til viðgerðar í løgtinginum, áðrenn hon varð samtykt í danska fólkatinginum.

Sambært donsku myndugleikunum, so er tað sera tíðarkrevjandi at skriva ES-fyriskipanir um til danskar lógir. Tá ynski úr Føroyum var, at lóggávan á fíggjarøkinum skuldi dagførast og svara til lóggávuna, sum var galdandi í ES og grannalondum okkara annars, skutu danir í 2013 upp nýggjan lóggávuleist. Í staðin fyri at skriva ES-fyriskipanir um til danskar lógir, varð skotið upp, at ES-fyriskipanin, hvørs ásetingar skuldu galda í Føroyum, varð viðløgd sum fylgiskjal til eina ríkislóg. Á henda hátt kundi arbeiði við at dagføra lógarverkið á fíggjarøkinum ganga munandi skjótari.

Lóggávuleisturin, har ásetingarnar í eini ES-fyriskipan verða settar í gildi fyri Føroyar umvegis eina danska ríkislóg, er royndur einaferð áður. Tað var í 2015, tá ásetingarnar í CRR-fyriskipanini[2] vórðu settar í gildi fyri Føroyar. Ein týðandi munur er tó ímillum hesa og lógina frá 2015. Eftir ynski frá landsstýrinum er innført í § 2, at danski ráðharrin á økinum skal hoyra Føroya Landsstýrið, áðrenn hann kann áseta kunngerðir við heimild lógini. Fyri landsstýrið er tað nevniliga av stórum týdningi, at lóggáva ikki verður sett í gildi fyri Føroyar uttan samtykki frá føroyskum myndugleikum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Hóast vit í Føroyum neyvan hava stórar trupulleikar av hvítvasking av peningi og fígging av yvirgangi, so er týdningarmikið fyri Føroyar, at lóggávan á økinum er dagførd og á hædd við lóggávuna í ES og grannalondum okkara annars. Saman við nýggju hvítvaskslógini tryggjar lógaruppskotið, at lóggávan á økinum er dagførd.

Føroyar eru partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar hjá FATF (Financial Action Task Force). FATF hevur sum høvuðsuppgávu at arbeiða fyri at fyribyrgja hvítvaski av peningi og fígging av yvirgangi. FATF sendir við jøvnum millumbilum fráboðanir við ávaringum um lond, har mett verður, at serligur vandi er fyri hvítvaski ella fígging av yvirgangi. Eisini er FATF á vitjan í limalondunum og ger í tí sambandi frágreiðingar, har staðfest verður, um limalondini hava nøktandi lóggávu á økinum.

---

[2] CRR stendur fyri Capital Requirement Regulation og snýr seg m.a. um kapitalkrøv og gjaldføriskrøv til peningastovnar.

Lóggávan á økinum er ikki dagførd fyri Føroyar síðan 2011, og hetta er ikki nøktandi í mun til tey krøv FATF ásetur. Tískil er umráðandi at fáa hesa lóggávu dagførda fyri Føroyar sum skjótast.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Uppskotið er í stóran mun ein dagføring av galdandi lóg. Týdningarmesta broytingin í nýggja uppskotinum er helst, at tað framyvir verður krav um, at saman við peningaflytingum skulu fylgja upplýsingar um móttakaran. Ein eyka skylda verður sostatt áløgd gjaldsmiðlarum, sum í hesum høpi eru føroysku peningastovnarnir.

Í lógaruppskotinum verður eisini størri dentur lagdur á at verja persónsupplýsingar. Krav verður sett um, at gjaldsmiðlarar skulu geva kundum sínum teir upplýsingar, ið teir hava rætt til.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Felagnum Peningastovnar, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Løgmansskrivstovuni, Landsbankanum og Dátueftirlitinum. Eingin av hoyringarpørtunum hevði viðmerkingar til uppskotið.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið ávirkar serliga føroysku peningastovnarnar. Hesir mugu tillaga sínar skipanir soleiðis, at nýggju ásetingarnar í lógini verða hildnar. Mett verður ikki, at talan er um stórt inntriv í virksemi hjá peningastovnunum.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið sampakkar við millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið sampakkar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Í § 3 í lógaruppskotinum verður ásett, at fyritøkur o.a. (løgfrøðiligir persónar) koma undir reglurnar í kapittuli 5 í føroysku revsilógini.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Av tí at talan er um ríkislógaruppskot, eru serligu viðmerkingarnar úr danska ríkislógaruppskotinum.

**Til § 1**

Det foreslås i § 1, at bestemmelserne i Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 2015/847 om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler, EU Tidende nr. L 141 (2. pengeoverførselsforordning), s. 1, skal gælde for Færøerne.

Ved en vedtagelse af lovforslaget vil 2. pengeoverførselsforordning vedtages som bilag til loven.

2. pengeoverførselsforordning fastsætter krav om de oplysninger, der skal medsende ved pengeoverførsler. Forordningen omfatter forpligtelser for betalers betalingsformidler, betalingsmodtagers betalingsformidler og mellembetalingsformidlere, derudover fastsættes krav til oplysninger, databeskyttelse, opbevaring af registreringer samt regler for sanktioner og overvågning.

**Til § 2**

Det foreslås i § 2, at erhvervsministeren kan, efter forudgående høring hos det færøske landsstyre, fastsætte regler for Færøerne om anvendelse af bestemmelserne i forordningen, jf. § 1, herunder om de ændringer af bestemmelserne, som de færøske forhold tilsiger.

Den foreslåede bestemmelse giver ikke hjemmel til, at fravige de materielle bestemmelser i 2. pengeoverførselsforordning, men alene bemyndigelse til at foretage de fornødne tilpasninger til de færøske forhold. Dette gælder dog ikke, hvor det følger af 2. pengeoverførselsforordning, at der er mulighed for fravigelser.

Den samfundsmæssige indretning og struktur m.v. på Færøerne er anderledes end i Danmark og de øvrige lande i EU. Bestemmelsen foreslås derfor indsat for at tilvejebringe hjemmelsgrundlaget for erhvervsministeren til at fastsætte administrative forskrifter med henblik på at tilpasse bestemmelserne i 2. pengeoverførselsforordning til de færøske forhold.

Tilpasningerne til de færøske forhold vil som udgangspunkt være rettet mod myndighedsstrukturen på Færøerne, herunder med særlig henblik på de færøske forhold, som adskiller sig fra de danske forhold. Bemyndigelsen i bestemmelsen kan dog også anvendes i forhold der ikke angår myndighedsstrukturer, herunder eksempelvis på processer, der er anderledes end de danske, og som er begrundet i de færøske forhold. Tilpasningen kan sammenlignes med tilpasning, der kan foretages ved udarbejdelsen af kongelig anordninger, hvor danske lovregler tilpasses de færøske forhold, således at reglerne kan anvendes på Færøerne.

Det er hensigtsmæssigt, at tilpasningerne til de færøske forhold sker i en administrativ forskrift. Dette er begrundet i, at disse tilpasninger har en teknisk karakter, hvorfor det sikres, at de nødvendige ændringer og justeringer kan foretages hurtigt og smidigt. Det er ligeledes hensigtsmæssigt, at tilpasninger til de færøske forhold kan ske løbende i takt med, at den fornødne erfaring med hvordan bestemmelserne i 2. pengeoverførselsforordning fungere i praksis er opnået.

Det følger af proceduren for fastsættelsen af de administrative forskrifter, der skal gælde for Færøerne, at de administrative forskrifter vil blive sendt i høring hos de færøske myndigheder under udstedelsen. Tilpasningen til bestemmelserne i 2. pengeoverførselsforordning sker dermed i samarbejde med de færøske myndigheder, således at bestemmelserne i 2. pengeoverførselsforordning vil kunne anvendes mest hensigtsmæssigt på Færøerne.

**Til § 3**

Det foreslås, at der kan pålægges selskaber m.v. (juridiske personer) strafansvar efter reglerne i 5. kapitel i den for Færøerne gældende straffelov.

Adgangen til at pålægge juridiske personer strafansvar afgøres i overensstemmelse med de almindelige principper for ansvarsplacering. I Rigsadvokatens meddelelse nr. 5 fra den 6. oktober 1999, er der fastsat nærmere retningslinjer for anklagemyndighedens valg af ansvarssubjekt i tilfælde, hvor anklagemyndigheden finder at kunne gennemføre en straffesag mod en juridisk person og en eller flere enkeltpersoner i anledning af samme forhold.

**Til § 4**

Med den foreslåede bestemmelse i *stk. 1* tilvejebringes hjemmelsgrundlaget for erhvervsministeren til at fastsætte tidspunktet for lovens ikrafttræden.

Baggrunden for forslaget er, at det er hensigtsmæssigt, at bestemmelserne, svarende til bestemmelserne i 2. pengeoverførelsesforordningen, træder i kraft i sammenhæng med reglerne, der gennemfører 4. hvidvaskdirektiv for Færøerne. 4. hvidvaskdirektiv er gennemført i dansk ret ved lov nr. 651 af 8. juni 2017. Denne lov vil blive sat i kraft for Færøerne ved en kongelig anordning. Det er hensigten, at den kongelige anordning der gennemfører 4. hvidvaskdirektiv for Færøerne og nærværende lov skal træde i kraft samtidig.

Det forslås med *stk. 2* at ophæve den gældende lov for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler. Det betyder, at ved denne lovs ikrafttræden ophæves samtidig lov nr. 467 af 17. juni 2008 for Færøerne om oplysninger, der skal medsendes om betaler ved pengeoverførsler.

**Skjøl sum fáa lógargildi**
Bilag 1: Pengeoverførelsesforordningen, Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 2015/847 om oplysninger, der skal medsendes ved pengeoverførsler.
Bilag 1.1: Berigtigelse 1 til Pengeoverførelsesforordningen 847 2015.
Bilag 1.2: Berigtigelse 2 til Pengeoverførelsesforordningen 847 2015

Fíggjarmálaráðið, 06.03.2019.

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni A. Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Almindelige bemærkninger (vanligar viðmerkingar)